

# Kvinna á brúnna hjá Eimskip

Frá íslendsku sjarmuoffensivini í Føroyum herfyri. Fv. Nýggi stjórin í føroyadeildini av Eimskip, Linda Gunnleiugsdóttir, Vígdis Finnbogadóttir, fyrrv. forseti, Valgerður Sverrisdóttir, vinnu-málaráðharri og stjórin í Norðurlandahúsinum, Helga Hjõrvar

*Eimskip fer undir at byggja nýggjan skrivstovubygning í Havn og eina saltgoymslu í Runavík. Leggja seg eftir at fáa føroyingum beinleiðis samband við leverandørar á meginlandinum*

JAN MÜLLER

Í sambandi við stóra og áhugaverda søluframtakið hjá íslendskum fyritøkunum í Havn herfyri varð eisini opið hús í stóra pakkhúsinum hjá Eimskip á eystaru bryggju. Og sum vant, tá íslendingar stíla fyri, so varð eisini veruligur stílur yvir tiltakinum, her ikki minst livandi tónleikur beinleiðis úr Íslandi.

Á samkomuni fyri innbodnum og luttakarunum á Tórrek framsýningini í Norðurlandahúsinum varð so ikki bert borðreitt við pinnamati og føroyskum og íslendskum bjóri. Har varð eisini borðreitt við einum spildurnýggjum stjóra. Eftir at hava røkt stjórastarvið seinastu trý árini takkaði Svavar Ottosson fyri seg og legði ábyrgdina av Føroyadeildini hjá Eimskip í hendurnar á starvsfelaga sínum Lindu Gunnlaugsdóttir, sum tekur við starvinum frá 1. mai.

Eimskip hevur deildir í fleiri londum, og hetta er fyrstu ferð í søgu Eimskips, at ein kvinna tekur yvir róðrið á brúnni á eini av deildunum.

Hon hevur starvast í Rotterdam seinastu árini. Fráfarandi stjórin er fegin um, at ein kvinna tekur við eftir hann. -Vit royna at hava javnstøðu í okkara fyritøku.

Tað er við ikki sørt av sorgblýdni, at Svavar Ottosson nú fer úr Føroyum. -Eg havi fingið nógv vinfólk bæði í arbeiðinum og millum føroyingar annars, og hetta hevur eisini verið eitt gott arbeiðspláss. Eg fari nú aftur til Íslands, og tað verður seinur dagur, at eg fari at gloyma Føroyar sigur Svavar, sum nú skal taka við starvinum sum stjóri fyri Vøruflutningsmiðstøðina hjá Eimskip. Hon tekur sær av flutningi við lastbilum í Íslandi.

Hvat leggur Svavar so eftir seg í Føroyum aftaná trý ár sum stjóri? -Tað kunnu kanska onnur døma um, men skal eg vera ærligur, so eri eg nøgdur við, at vit øll í felag hava megnað at tvífalda virksemi hjá Eimskip hetta tíðarskeið. Vit hava økt um vørumongdina, og fíggjarliga úrslitið er eisini betrað. Men eg eri ikki minst glaður um at hava verið við til at økja um flutningsmøguleikarnar hjá føroyingum.

Týdningarmestu hendingarnar heldur Svavar verða, at teir fóru undir at sigla á Klaksvíkina, at sigla beinleiðis úr Føroyum til USA, og at støðið er lagt undir nýggjan skrivstovubygning.

Hann upplýsir annars, at teir júst hava undirskrivað sáttmála um ein bygning á havnaøkinum í Runavík, ið skal goyma og selja salt. Tað verður eitt dóttirfelag hjá Eimskip, sum stendur fyri hesum.

Svavar Ottosson heldur, at týdningarmesta uppgávan hjá eftir“manni“ sínum verða at víðka um og betra um møguleikarnar hjá føroyingum at flyta vørur úr og til Føroya. Her hugsar hann ikki minst um at skapa umstøður hjá føroyingum at kunna keypa beinleiðis úr framleiðaralondunum.

-Nú tit útbyggja seg nógv í Føroyum, er ætlanin at taka allan marknaðin?

-Vit eru ímóti monopoli. Vit vilja hava kapping. Vit síggja fegnir, at tað eru aðrir enn vit á marknaðinum. Er tú einsamallur, so gevst tú rætt og slætt við at hugsa og endurnýggja teg.

Eimskip er eisini við til at gera seg út til komandi oljuvinnuna. Teir ætla sær at fáa lut í tí flutningi, sum verður í sambandi við komandi oljuleiting.



Nýggi stjórin í Eimskip ´í Føroyum her saman við fráfarandi stjóranum og innbodnum. Uttast til høgru stjóri í Eimskip í Íslandi, sum var við til samkomuna

**Myndir Jens K. Vang**



# Endurskoða sáttmálan við IRF

*Hvussu ein nýggjur sáttmáli kemur at verða, ber ikki til at siga í løtuni., sigur Eyðun Eltør, oljumálaráðharri, m.a. í svari til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Herfyri fingu allir landsstýrismenn sama fyrispurning frá umboðum javnaðarfloksins á tingi, og nú fara svarini so smátt at koma til hesar fyrispurningar. Fyrispurningarnir vóru allir um játtan og nýtslu viðvíkjandi teim ymisku málsøkjnunum hjá landsstýrismonnum, og Hans Pauli Strøm spurdi oljumálaráðharran, Eyðun Eltør, um oljumál o.a., og vildi hava eina meting av samlaðu nýtsluni innan § 9 á fíggjarlógini (Oljumál o. a.) fyri ár 2000, á øllum konti, har mett verður, at játtanin ikki fór at halda. Talan er um allar rakstrar-, lógarbundnar og aðrar útreiðslur fyri árið sæð í mun til játtanina á fíggjarlógini. Eisini vildi Hans Pauli Strøm vita, hvørji stig ætlanin er at taka fyri at tryggja, at hesar játtanir halda?





**Friðingarnevndir**

Í svarinum sigur oljumálaráðharrin, at illa ber til at leggja nýtsluna higartil til grund fyri metingunum fyri útreiðslurnar á § 9 restina av árinum, tí tær fella ikki javnt yvir árið. Viðvíkjandi játtanini fyri náttúrufriðingarnevndir, so er hon 240 tkr.

– Ógjørligt er so tíðliga á árinum at siga, hvussu stórt fundarvirksemið verður hjá friðingarnevndunum fyri alt árið. Fer tað at vísa seg út á árið, at játtanin ikki er nóg stór, fer at verða biðið um eykajáttan, tí friðingarnevndirnar hava skyldu at taka mál upp, ið verða løgd fyri tær, sigur Eyðun Eltør.

**Spillolju**

Viðvíkjandi spilloljureinsan, sigur Eyðun Eltør, at sambært sáttmálanum endurrindar landsstýrið IRF fyri hall av hesum virksemi. Til endamálið eru játtaður 2,3 mió. kr. Hetta verður møguliga ov lítið.

– Stig eru tikin til at endurskoða sáttmálan við IRF. Hvussu ein nýggjur sáttmáli kemur at verða, ber ikki til at siga í løtuni. Vísir tað seg, at játtanin gerst ov lítil, kann gerast neyðugt at biðja um eykajáttan.

**Serkøn ráðgeving**

Viðvíkjandi fyrisitingini, sigur Eyðun Eltør, at partar av virkseminum hjá Oljumálastýrinum eru enn so nýggir og skiftandi, at torført er at meta um útreiðslur og inntøkur. Hvørt útreiðslur og inntøkur fyri hetta fíggjarárið koma at halda ber enn illa til at siga.

– Serliga eru tað útreiðslur til keyp av serkønari ráðgeving í samband við viðgerðina av umsóknum til leiti- og framleiðsluloyvi, ið eru torførar at meta um. Tað sama er við mettum inntøkum frá umsóknargjøldum. Skuldi tað víst seg, at játtanin ikki kemur at halda, kann gerast neyðugt at søkja um eykajáttan, sigur Eyðun Eltør.



## Konsert í Fríðrikskirkjuni sunnukvøldið

Nú sunnukvøldið — 7. Mai — verður konsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum. Tað eru Manskórið á Skálafjørðinum og Skúlakórið í framhaldsdeildini í Runavík, ið saman bjóða fólki út í kirkjuna hetta kvøldið.

Manskórið á Skálafjørðinum hevur nú nøkur ár á baki.Teir hava hesi seinastu árini sett dám á so mong tiltøk. Fyri ikki so langari tíð síðani var kórið ein sunnumorgun úti í Rituvíkar Kirkju og setti sín dám á kirkjugongdina har. Nú sunnudagin fara teir at syngja til gudstænastuna í kirkjuni á Glyvrum. Um kvøldið verður so farið í Fríðrikskirkjuna.

Skúlakórið man ikki vera so kent millum manna. Kortini hevur tað verið við til onkra jólakonsertina áður. Tað er nú so, at manningin í eini framhaldsdeild skiftir hvørt skúlaár, og tískil missir eitt slíkt kór sangarar á hvørjum ári, samstundis sum nýggir koma til í hinum endanum. Áhugin at vera við í kórinum er stórur millum skúlaungdómin. Hetta verður so á fyrsta sinni, at núverandi manningin sleppur at royna seg í Fríðrikskirkjuni. Saman við teimum 30-35 ungfólkunum úr framhaldsdeildini í Runavík vera eisini tónleikarar.

Konsertin verður sunnukvøldið klokkan 21:00.

# Sjálvstýrisflokkurin hevur landsfund

*Landsfundurin hjá Sjálvstýrisflokkinum, sum skuldi vera í Klaksvík um vikuskiftið verður í Saltangará í staðin*

Leygardagin 6. mai hevur sjálvstýrisflokkurin landsfund. Upprunaliga varð ætlað at fundurin skuldi vera í Klaksvík, men ymisk praktisk viðurskifti hava gjørt, at neyðugt varð at flyta fundin. Landsfundurin verður sostatt í Stokkastovuni í Saltangará leygardagin 6. mai kl. 10.00.

Fundurin verður hildin sambært lógum felagsins. Uppskot til broytingar í lógum felagsins er sent Landsfelagnum. Tað verður tí helst hildin ein eykaaðalfundur, stutt eftir landsfundin, har støða verður tikin til tær lógarbroytingar, sum skulu fremjast.

Av tí at so stórar og týðandi avgerðir fyri framtíðarstøðu Føroya standa fyri framman, verður landsfundur eisini hildin í heyst. Hesin er settur at vera í Klaksvík.

Ein sáttmáli millum Føroyar og Danmark, sum fólkið tekur undir við er endamálið

Nógv stór mál eru á skránni. Landsstýrið samráðist í løtuni við donsku stjórnina um ein nýggjan sáttmála millum Føroyar og Danmark. Ein sáttmála sum gevur Føroyum fult sjálvstýri og fullan sjálvsavgerðarrætt. Eitt mál, sum flokkurin tekur í stórsta álvara. Endamálið við samráðingunum er at koma fram til eitt sáttmálauppskot, sum fólkið tekur undir við. Bara ein fólkaatkvøða kann tryggja tað.

Vælferðarsamfelagið skal mennast og byggjast út

Framstig eru gjørd á nógvum økjum, sum flokkurin hevur ábyrgdina fyri. Fólkapensjónin er hækkað, semja er fingin um nýggjan leiðslubygnað á Landssjúkrahúsinum, sett er út í kortið eitt ein byggi- og umvælingarætlan, sum fær sjúkrahúsverkið upp á eitt nøktandi støði. O.s.fr.

Hesa positivu gongd skulu vit framhaldandi tryggja.

**Burðardygg oljuvinna**

Vit eru á veg inn í eitt tíðarskeið, har oljuvinnan kann koma at hava stóran týdning fyri samfelagið. Sjálvstýrisflokkurin umsitur hetta stórmál, og longu nú 17. mai, fæst at vita, hvussu stórur áhugin er at fara undir hesa vinnu í Føroyum.

Vit skulu tryggja eina burðadygga gagnnýtslu av hesum tilfeingi fyri samfelag, einstakling og náttúru og fiskivinnu.

Hesi og onnur mál verða viðgjørd í politiska orðaskiftinum á landsfundi sjálvstýrisfloksins.

**Landsfelag Sjálvstýrisfloksins**
**Ronald Poulsen, formaður**


Føroya best umtókti vøruvognur
– nú aftur á goymslu
Ford Express Van 1,8 diesel



Sosialurin - 311820

Og prísurin er framvegis heilt í botni:
kr. 99.900,00 v/MVG

Ford P/f Wenzel Ford

Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tel. 313873 - Fax 311173 - www.wenzel.fo